## Rógvi í argentinskum blað

Málið hjá Rógva Jacobsen hevur vakt ans kring allan heim. Soleiðis kundu lesararnir hjá argentinska fótbóltsblaðnum, Olé, lesa heilsíðugrein, har samrøða var við føroyska timburmannin. Við heitinum, La increible historia de Rógvi Jacobsen, verður sagt frá ævintýrinum, tá timburmaðurin úr Atlantshavi skoraði móti heimsins bestu. Sum lítlar stubbar á somu síðu verður skrivað um brasilska landsliðið og um nýggja Juventus-venjaran, Claudio Ranieri.


No es de madera

## Tíðindastjórin heldur fram

Fremad Amager hevur boðað frá, at tíðindastjórin í felagnum, Ken Foltmar, heldur fram í felagnum. Foltmar hevur verið tíðindastjóri seinastu 10 árini, men eftir eigaraskiftið var ivi reistur um, hvørt hann skuldi halda fram í starvinum. Tað hava føroysku eigararnir einki ímóti, og sjálvur sigur Foltmar, at hann fegin játtaði at halda fram í sessinum.

# Fróði og Holst sleppa upp í part




*Christian Lamhauge Holst var um reppið at skapa tí heilt stóru sensatiónina, tá hann varð skiftur inn leygardagin. Hesa ferð bendir alt á, at hann fær møguleikan frá byrjan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Nýtt fólk verður í fýra plássum. Andrew av Fløtum víkir úr álopinum fyri Christian Lamhauge Holst, og Fróði Benjaminsen verður miðverji fyri Jón Róa Jacobsen, sum verður vongverji**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið framdi føroyska landsliðið eitt tað besta leikliga avrikið, sum føroyingar nakrantíð hava sýnt.

Hóast glæsiliga avrikið hevur Jógvan Martin Olsen gjørt av, at fleiri broytingar skulu gerast á føroyska liðnum, sum klokkan 17.15 í dag skal spæla á Svangaskarði ímóti Skotlandi.

Tveir spælarar – Fróði Benjaminsen og Christian Lamhauge Holst – eru nýggir á liðnum, og Marni Djurhuus og Andrew av Fløtum hava fingið at vita frá venjaranum, at teir skulu sita á beinkinum, tá ið fyrsta bríkslið verður seinnapartin.

Sammett við síðsta leygarkvøld verður talan um nýtt fólk í fýra plássum ímóti Skotlandi. Tað vístu taktisku venjingarnar í dýrdar veðrinum á Tórsvølli stutt fyri døgurða í gjár. Talan var um einastu venjingina í gjár og harvið um síðstu venjingina undan dystinum ímóti Skotlandi í dag.

### Jón Rói vongverji

Jákup á Borg, sum tað í blaðnum í gjár varð gloppað fyri kanska før at missa plássið hesa ferð, verður miðvallari í høgru, soleiðis sum hann var tað ímóti Italia. Harvið er tað greitt, at venjararnir ikki geva Símuni Samuelsen møguleikan frá fyrsta bríksli. Men tað er einki at ivast í, at tað eftir avrikið hjá Símuni ímóti Italia, nú er lættari hjá venjaranum at geva føroyinginum í Keflavík møguleikan í øðrum borðinum ella hinum, enn tað hevur verið tvær tær seinastu ferðirnar.

Tað hevur so at siga verið greitt alla tíðina, at Fróði Benjaminsen fór at vinna pláss millum teir fyrstu ellivu, eftir at hann var leikbannaður ímóti Italia. Fróði fær plássið undir liðini á Óla Johannesen. Tað ber við sær, at tað ikki verður pláss fyri Jón Róa Jacobsen í miðverjuni.

Men landsliðsvenjarin er ikki sinnaður at senda superligu spælaran út á beinkin. Jón Rói verður hesa ferð vongverji í høgru. Hann hevur fleiri ferðir seinastu vikurnar roynt seg í hesum plássinum í AaB.

Atli verður vongverji í vinstru. Harvið er tað greitt, at Marni Djurhuus, sum hevur røkt vinstra vongverjan fleiri tær seinastu ferðirnar, hesa ferð verður á beinkinum, tá ið dómarin fer at bríksla fyri fyrstu ferð.

Hóast landsliðsvenjarin hevur sagt seg vera stak væl nøgdan við Marna Djurhuus og hvussu høgt botnstøði kollfirðingurin í EB/Streyma miðverjuni hevur víst, so hevur hann gjørt av at hella seg til Atla Danielsen.

### Býta um

Undan Italia dystinum var stórur ivi um, um tað fór at verða Andrew av Fløtum ella Christian Lamhauge Holst, sum fór at verða fremsti maður. Eitt sindur óvæntað var tað, tá ið venjarin leygardagin valdi Andrew av Fløtum til fremsta plássið.

Nú bendir nógv á, at Christian Lamhauge Holst fer at fáa møguleikan í kvøld. Talan er um einsamallan sess, og spælarin, sum røkir hann, er rættuliga í andglettinum.

Undan Italia dystinum lá tað í luftini, at Andrew av Fløtum fór at verða avloystur av Christian Lamhauge Holst. Í dag er støðan tann sama bara við mótsattum úrslitið. Tað kann væl hugsast, at Andrew fer at loysa Christian av.

Út frá hesum fer føroyska liðið at síggja soleiðis út seinnapartin í dag: Jákup Mikkelsen – Jón Rói Jacobsen, Óli Johannesen, Fróði Benjaminsen, Atli Danielsen – Jákup á Borg, Mikkjal Thomasen, Súni Olsen , Christian Høgni Jacobsen - Rógvi Jacobsen – Christian Lamhauge Holst.

Jákup Mikkelsen fer at verja føroyska málið fyri 50. ferð. Hann er áttandi føroyski spælarin, sum røkkur merkisverda dystartalið, og hann er annar málverjin, sum røkkur teimum hálvhundrað. Hin er Jens Martin Knudsen, sum nú er knýttur at landsliðnum sum málmansvenjari. Jens Martin rakk 66 landsdystum í tíðarskeiðnum 1988-2005. Jákup, sum er føddur 16. august í 1970, spældi fyrstu ferð á landsliðnum í 1995.

## Trúðu ikki Ferguson

**Liðfelagarnir høvdu ilt við at trúgva skotska liðskiparanum, tá hann greiddi frá, at hann á seinastu Føroya-ferðini vaknaði, við at ein seyður hugdi inn á kamarsvindeyga hansara**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sambært skotska blaðnum Daily Record, so høvduskotskuspælararnir ilt við at trúgva tí, tá Barry Ferguson greiddi teimum frá, hvussu tað var at vera í Føroyum.

Ferguson, Davie Weir og Cristian Dailly vóru eisini við, tá skotar vitjaðu seinast, og liðfelaganir flentu í kíki, tá hesir tríggir greiddu frá, hvussu føroyingar høvdu gras á takinum og hvussu hann tann eina morgunin vaknaði, meðan ein seyður hugdi inn á kamarsvindeygað hjá sær.

- Men teir sóu, tá vit komu her, at alt passaði, sigur Ferguson við blaðið.

Hóast lagið eisini var skemtandi, so ávarar Ferguson um, at talan verður um alt annað enn lættan dyst hjá skotum í Føroyum.

- Men hetta er millum annað tað, sum altjóða fótbóltur snýr seg um. Tú skalt eisini duga at koma til slík støð og vita, at treytaleysa kravið er trý stig. Tað megnaðu vit ikki seinast, men eg haldi sjálvur, at vit hesa ferð eru nógv betri fyri til dystin. Bæði tí vit hava eitt betri lið, men eisini tí vit nú vita, hvat skal til.

- Teir spæla við nógvum fólki aftan fyri bóltin, og tí mugu vit ansa eftir, at vit ikki leypa framav, samstundis sum vit skulu leggja trýst. Eg veit væl, at føroyingar halda, at hetta er ein dystur, sum teir kanska kunnu fáa stig burturúr. Men tað er upp til okkum at prógva, at hetta ikki verður so, segði Ferguson.

Saman við Darren Fletcher úr Manchester United verður Ferguson roknaður sum ein av avgjørdu lyklaspælarunum hjá skotum til dystum. Tað verða mest sannlíkt teir báðir, sum manna miðvøllin, og tí verða tað teir, sum skulu stýra skotska trýstinum, ið ætlandi skal geva teimum sigurin.



*Barry Ferguson er fult vitandi um, at skotar skulu vera 100 prosent til reiðar at spæla dyst í Føroyum.*
*Eisini hóast Føroyar ikki líkjast nøkrum øðrum landi, har teir hava vitjað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*